# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fýra ung meistaralið í flogbólti

**Leygardagin var føroyameistarakapping í flogbólti hjá teimum yngru liðunum, og fýra lið kundu fara heimaftur við gullmerkjum.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Spælt var í høvuðsstaðnum, har Gundadalshøllin, Ítróttarhøllin á Hálsi og Hoyvíkshøllin vóru karmur um eina rúgvu av dystum, og í fýra av átta aldursbólkum vóru bæði meistaraheiti og heiðursmerki avgreidd.

Í bólkinum gentum 10 ár vann Dráttur gull, TB silvur og KÍF bronsu, og í bólkinum gentur 12 ár vann Fleyr gull, Dráttur silvur og Mjølnir bronsu.

Fleyr vann eisini gull í bólkinum dreingir 10 ár, har SÍ vann silvur og Dráttur bronsu, og í bólkinum dreingir 12 ár vann B68 gull, SÍ silvur og Dráttur bronsu.

## Fýra finalur eftir

Í hinum fýra bólkunum verða finalurnar spældar í Trongisvági um tvær vikur, so har var funnið fram til finalistarnar, samstundis sum bara bronsuvinnararnir fingu síni heiðursmerki leygardagin.

Í bólkinum gentur 14 ár skulu KÍF og TB spæla finalu, og Fleyr vinnur bronsu. Og hjá kvinnuunglingunum verður finalan millum Mjølnir og Fleyr, og SÍ fær bronsu.

TB og Fleyr spæla finaluna hjá dreingjum 14 ár, og har vinnur Mjølnir bronsuna, og hjá mansunglingunum verður finalan millum SÍ og Fleyr, og Nøvan fær bronsuna.



*Nógvir dystir vóru á skránni leygardagin, tá tey ungru kappaðust um meistaraheitini í flogbólti*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Dráttur-KÍF 3-2 (14-25, 32-30, 25-22, 22-25, 15-8)

# Tungur dráttur hjá Drátti

**Sum væntandi var, gjørdist tað tungt hjá Drátti at draga sær ein sigur í land ímóti KÍF. Men tað gekk at enda.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Sunnudagin var KÍF á vitjan hjá Drátti á Giljanesi, og tað gjørdist akkurát líka javnt og spennandi, sum væntast kundi frammanunda. KÍF, sum er næstniðast, hevur fyrr í vetur víst tenn ímóti fremru liðunum og eitt nú vunnið á greipuvinnarunum úr SÍ.

At hetta kundi gerast ein tungt dráttur hjá Drátti, sum roynir at sleppa fram í kappingina um silvur og bronsu, kom til sjóndar beinanvegin, tí í fyrsta settinum sópaði KÍF alla mótstøðu til viks og vann stórt.

Men Dráttur skuldi og vildi sleppa inn í dystin, og tí gjørdist annað sett tann mest spennandi og dramatiska løtan í dystinum. Hvørgin parturin vildi sleppa settinum, sum Dráttur tó at enda fekk avgjørt til endaligan fyrimun, heili 32-30!

Dráttur tók sjálvsálitið við sær til triðja sett, sum var vunnið tepurt við trimum stigum, men í fjórða setti svaraði KÍF aftur við at vinna somuleiðis við trimum stigum, so tí mátti eitt fimta og avgerandi sett til.

Her eydnaðist Drátti, sum hevði byrjað tey bæði undanfarnu settini betur, at halda fram við tí, og tað rakk so til 15-8 og sigur í dystinum, ið tað var so umráðandi hjá Drátti at vinna, nú kappingin í endaspurtinum herðist.

ÍF-TB 3-0 (25-15, 25-12, 25-23)

# ÍF á bronsuplássinum

**Við øðrum sigrinum innan fyri minni enn eina viku, hevur ÍF yvirhálað fleiri av kappingarneytunum og liggur í løtuni til bronsu.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fyri fáum døgum lá ÍF á fimta plássinum við færri dystum enn flestu av kappingarneytunum, men eftir útisigurin á Mjølni týskvøldið í farnu viku, helt ÍF sunnudagin fram við heimasigri á TB, og nú hevur ÍF yvirhálað bæði Drátt og Mjølnir og liggur nummar trý.

Ikki kann sigast, at mótstøðuliðið av Tvøroyri hevur ta styrki, tað hevur havt, og hetta kom eisini til sjóndar á Kambsdali sunnudagin, tá ÍF sera lætt vann tey bæði fyrstu settini og legði øll lunnar undir ein sigur, ið øll nokk eisini høvdu væntað.

Men í triðja setti gjørdist mótstøðan frá TB munandi dyggari, og tað skuldi nokk so fitt meira til hjá ÍF at vinna tað. Tó bar til, og ÍF vann dystin 3-0 og staðfesti sína støðu sum ein av sterkastu heiðursmerkjaavbjóðarunum.

Næsta sunnudag tekur ÍF ímóti KÍF, sum beit frá sær ímóti Drátti, og um tvær vikur skal ÍF til Havnar at spæla ímóti Fleyr. Sum tað sær út í løtuni, verður hetta kanska tann stóra silvurfinalan í Eik-liguni hjá kvinnunum…

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 17 | 15 | - | 2 | 48 | 22 | 26 | 19 |
| 2 Fleyr | 16 | 10 | - | 6 | 35 | 25 | 10 | 13 |
| 3 ÍF | 16 | 9 | - | 7 | 33 | 26 | 7 | 12 |
| 4 Dráttur | 16 | 9 | - | 7 | 36 | 30 | 6 | 11 |
| 5 Mjølnir | 16 | 9 | - | 7 | 28 | 28 | 0 | 10 |
| 6 KÍF | 17 | 5 | - | 12 | 29 | 41 | -12 | 7 |
| 7 TB | 16 | 0 | - | 16 | 4 | 48 | -44 | 0 |